## Føroyingar spæla El-hockey

Sunnudagin 6. juli varð el-hockey roynt á fyrsta sinni í Føroyum. Á Hálsi í Havn, hevði ÍSB skipað fyri einum “Kom og royn” tiltaki, har fysiskt rørslutarnað kundu royna el-hockey. El-hockey er ein ítróttur, sum verður spældur av fysiskt rørslutarnaðum, sum oftast hava eina av fylgjandi prognosum: vøddasvinn, spasticitet, ryggmergsbrokk, liðagikt, og teimum sum eru komin til skaða í trafikkinum, ella eru komin til skaða á annan hátt. ÍSB vil við hesum tiltøkum royna, um tað er møguligt at byrja við eini nýggjari ítróttagrein, fyri børn og ung, sum ikki hava møguleika at lutaka í einum av verðandi tilboðum. El-hockey verður aftur á Vestanstevnuni í Miðvági, sunnudagin tann 13. juli frá kl. 16, í bygdarhúsinum. Tað er ókeypis at royna El-hockey.



# Seks metrar aftari so kom Fa



*Nógvur sjógvur rann úr lastini, tá Falkur bleiv tikin upp á skipasmiðjuna*

**Hevði kúlustevnið á Heyki rakt Falk aftan fyri maskinskottið, kom Falkur neyvan aftur til lands**

Um einar fjúrtan dagar fer Falkur aftur til fiskiskap, tí tá verður Tórshavnar Skipasmiðja liðug at umvæla skaðan, sum partrolarin hjá Førtoya Fiskavirking fekk, tá makkari hansara, Heykur, rendi inn í síðuna á honum á Sandoyarbankanum tíðliga sunnumorgunin. Tað var gott veður, tá óhappið hendi, men kjaftsvart í mjørka.

Kúkustevniðá Heyki gjørdi eitt meiri enn tveir metrar høgt og ein metur breitt hol undir vatnganginum í bakborðssíðu á Falki, og sjógvurin fossaði inn í lastina. Nakað av sjógvi kom eisini í maskinrúmið, men tað eydnaðist manningini at skalka lúkurnar har. Tað vísti seg, at pumpurnar kláraðu at halda skipinum lens, og Falkur setti so kós ímóti Havnini, hagar hann og Heykur komu nakað fyri middag í gjár.



### Heppið hóast alt

Meinhard Jacobsen, stjóri á Fisdkavirking og reiðari á Falki og Heyki, var komin á bryggjuna í Havn at taka ímóti skipunum. Hann var sum vera man harmur um tað, sum var hent, men fegnaðist samstundis um, at eingin mansskaði stóðst av tilburðinum.

Heykur rakti Falt mitt í lastina og einar seks metrar framman fyri skottið millum lastina og maskinrúmið.

Á Tórshavnar Skipasmiðju eru tey ikki í iva um, hvat hevði hent, at kúlustevnið rakti Falk teir seks metrarnar aftari:

- Ja, so hevði Falkur neyvan komið aftur til lands, sigur Mourits Mohr. Hann vísir á, at var holið afturi í maskinrúminum, hevði skipið mist elveitingina, og so høvdu pumpurnar ikki virkað.

## Fiskurin fór til slógv

Falkur og Heykur høvdu júst hálað, tá skipini stoyttu saman. Falkur hevði umleið 100 kør ella góð 60.000 pund av fiski í lastini, tá óhappið hendi. Tað vísti seg, at bara ein lítil partur av fiskinum kundi brúkast, og tí fór meginparturin til slógv.